# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvat gera vit á fólkatingi?

Enn einaferð taka vit í Miðlahúsinum stig til eitt viðkomandi og aktuelt Trapputing. Hesaferð verður Trapputingið eisini startskot til fólkatingsvalstríðið, har vit leggja pall og mikrofon til orðaskiftið millum topkandidatarnar hjá politisku flokkunum. Eitt orðaskifti, sum vónandi fer at varpa ljós á leiklut okkara á danatingi.

Mong munnu vera samd við okkum um, at tað til tíðir kann vera sera torført at síggja fyrimunin við hesa løgnu umboðan okkara. Aftaná knøpp trý fullkomiliga einkisigandi ár fyri føroyska fólkatingsumboðan, hava umboð okkara skorað kassan, og tjóðin millum lítið og onki fingið burturúr. Meðan annað umboðið spælir leiklutin sum pínslaváttin úr norðurhøvum, hevur hitt umboðið, riddarin av danabrók, als ongan leiklut spælt. Hvat er frægari er ilt at siga.

Við Trapputinginum rópa vit veljaran til fundar. Orðaskiftið verður varpað beinleiðis á Rás 2, og aftaná verður umrøða her í blaðnum. Soleiðis røkja vit uppgávu og málsetning okkara, at vera ein virkin viðspælari í demokratiska orðaskiftinum, at loyva ymiskum áskoðanum framat og at varpa meiningar út um alt landið. Soleiðis kunnu vit, sum fjórða statsmaktin, eisini geva okkara íkast til fólkaræðið.

Hvat valstríðið til fólkatingið skal snúgva seg um her hjá okkum, er enn óvist. Hóast ein vika longu er farin av valstríðnum er lítið komið fram um, hvat hetta valið skal snúgva seg um.

Okkara uppáhald er, at langt er ímillum góðu grundgevingarnar fyri einum framhaldandi umboðan á fólkatingi, og lítið er, sum vit ikki kundu framt og røkt, vóru vit sessirnar fyriuttan. Og vit seta Trapputinginum spurningin: Hvat gera vit á fólkatingi?

**Sosialurin**

## Gongur Jóan Pauli Joensen í svøvni

**KRISTIAN MAGNUSSEN**
løgtingsmaður



Í síðstu vikuskiftisdimmu loypur Jóan Pauli Joensen sum ketta úr høvdatrog á meg, tí at eg skal hava sovið í tímanum í samband við mín leiklut í viðgerðini av uppskotinum um Stjórnarskipan Føroya. Í dimmu sigur hann m.a., at hann tann 18. desember 2006 handaði løgmanni álitið um Stjórnarskipan Føroya, og at hetta álit man vera tað mest viðgjørda í Føroyum nakrantíð.

Hví hann nú loypir á meg skilji eg ikki rættiliga. Málið um Stjórnarskipan Føroya byrjar ikki í 2006, men í 1998. Tá fingu vit eina samgongu, ið skuldi loysa okkum úr ríkisfelagsskapinum við Danmark ongantíð ov skjótt.

Í samgonguskjalinum frá 1998 undirskrivaðu tríggir statistar hjá Høgna Hoydal, Sjúrða Skaale og øðrum undirhaldarum, Annfinn Kallsberg, Helena Dam á Neystabø og Heini O. Heinesen m.a, at "Føroya løgting samtykkir í komandi tingsetu (1998) lóg um at seta grundlógarnevnd, ið skal gera uppskot til føroyska grundlóg. Tá grundlógin er samtykt á løgtingi, fer hon til fólkaatkvøðu í seinasta lagið ár 2000".

Nógvir føroyingar spældu við uttan at mukka, eisini Jóan Pauli Joensen, ið átók sær at verða formaður í grundlógarnevndini. Fyri mánaðarliga samsýning átók hann sær, at fremja arbeiðssetningin til ásettu tíðina. Tá hann nú á heysti 2007, nývaknaður og rættuliga fortørnaður leggur eftir mær í samband við arbeiði við Stjórnarskipan Føroya, má eg tala at.

Hann átók sær eina lønta uppgávu sum skuldi verða liðug í 2000 og sum kanska bara var hálvliðug, tá hann handaði løgmanni hana á jólum í 2006, aftaná at hann við mánaðarligari samsýning í átta ár hevur havt evstu ábyrgd av arbeiðinum. Umframt sína egnu løn hevur hann havt fulltíðarløntir skrivarar og serfrøðingar knýttir at sær øll hesi árini.

Løgmaður fekk álitið, ið skuldi verið liðugt í 2000, tveitt í føvningin undan jólum í fjør, og royndi síðan sum fragast at sleppa undan hesum jólatrøllinum. Í vár fekk hann góðkenning frá øllum flokkum á tingi til at leggja uppskot fyri løgtingið um at seta eina nevnd at arbeiða víðari við stjórnskipanaruppskotinum. Stjórnarskipanarnevndin, ið varð mannað við tingmonnum úr øllum flokkum varð vald 7. mai 2007. Í dimmu sigur Jóan Pauli at "Synd er at siga, at nógv er hent í hesi nevnd, sum bert hevur havt ein einasta fund, nevniliga tá nevndin varð skipað 29. mai 2007. Tvey uppskot vóru til formann Finnur Helmsdal og Kristian Magnussen. Kristian Magnussen varð valdur til formann.

Eftir skipanarfundin hevur eingin fundur verið í nevndini, so tað ber ikki til at siga, at formaðurin Kristian Magnussen hevur verið nøkur beinleiðis eldsál. Tað er púrt einki hent."

Tað átti ikki verið neyðugt hjá mær at mint gamla formannin í grundlógar- og síðan stjórnarskipanarnevndini á, hvussu okkara tingsskipan virkar, men tað er óivað neyðugt í hesum førinum. Av tí, at nevndin varð sett sum ein løgtingsnevnd sbr. tingskipanini § 25, fullu hennara heimildir burtur á ólavsøku í ár. Tað vil við øðrum orðum siga, at á ólavsøku vóru hvørki nevnd ella mál til longur. Eg, saman við øðrum løgtingslimum, fekk sum uppgávu at loysa allar teir óloystu spurningarnar sum Jóan Pauli í 8 ár hevði fingið løn fyri at loysa, nú nakrir dagar áðrenn løgtingslimir fóru í summarfrí – eg meini tað.

Sjálvandi ber til at reisa málið av nýggjum í hesi tingsetuni. Men hví eg av øllum skal taka stig til at leggja nýtt uppskot fyri tingið um skipan av løgtingsnevnd, skilji eg ikki rættiliga. Javnaðarflokkurin var ímóti at seta hetta grundlógararbeiði í gongd í sínari tíð. Skal Jóan Pauli harta nakran eigur hann fyrst og fremst at harta loysingarfólkini í tinginum fyri ikki at hava tikið stig til at taka arbeiði uppaftur?

## Hvør velur KRÍM?

**MAUD WANG HANSEN**



Trúði tú eisini, at koppsetingin móti krími var ókeypis fyri allar pensjónistar?

Nei, tað er hon ikki.

Hon er ókeypis fyri fólkapensjónistar, t.e. tey frá 67 árum og eldri.

Fyritíðarpensjónistar mugu sjálv gjalda fyri hesa koppseting. Tað uttan mun til um tað vegna heilsuveikleika er alneyðugt at fáa koppsetingina.

Fleiri fyritíðarpensjónistar eru fólk við veikari heilsu.

Summi fólk, sum ikki meta slíka koppseting vera neyðuga, velja neyvan at fylgja vegleiðing frá læknanum, um so er, at hetta kostar teimum 250,-.

Og tað er væl skilligt. Um vit altíð gjørdu tað, sum er best fyri okkum sjálv, so sá heimurin heilt øðrvísi út. Men tað er sannroynd, at menninskjan í summum føri ikki metir seg sjálva vera nóg týdningarmikla. Hetta kann fáa avleiðingar, sum eru torførar at meta um frammanundan.

Um samfelagið metir tað vera kostnaðarliga meira forsvarligt, at fólk koppseta seg móti krími, átti vit eisini at borið so í bandi, at allir pensjonistar fáa koppsetingina ókeypis. Tá velur tú sjálv og skal ikki hugsa um, hvørt tú vilt brúka av tínum egnu fáu krónum.

Tá velur samfelagið fyribyrging og góða fólkaheilsu fyri allar pensjonistar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.